# Námsfrøðingur til Dagstovnin á Flatinum

**Vit søkja eftir 1 námsfrøðingi til barnagarðsstovuna á Túvu 30 t um vikuna, at byrja 1 november ella eftir nærri avtalu. Á Túvu ganga 17 børn í aldrinum 3-5 ár**

**Vit ynskja**
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum,
- at tú kanst taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagaðar og foreldur
- at tær dámar væl at verða úti og sært møguleikar og avbjóðingar, sum eru í nærumhvørvinum.
- at tú verður við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvið

**Vit kunnu bjóða**
Eitt áhugavert starv, har tú saman við góðum starvsfelagum, fært møguleika at byggja upp eitt spennandi pedagogiskt umhvørvi á einum nýggjum stovni.

**Um stovnin:**
Vit eru 85 børn í aldrinum 0 – 10 ár og 23 starvsfólk. Stovnurin er skipaður í 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur og 1 frítíðarstova .
Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar bæði innan og uttandura, hvør barnastova er ein sjálvstøðug vælútgjørd eind, umframt eitt stórt felagsrúm, viðtaluhølið, serstova og ymisk verkstøð. Økið uttanfyri er stórt við nógvum møguleikum, og stovnurin liggur sera væl fyri t.d. beint við haga og fjøru, við skúla, fimleikarahøll, svimjihøll og góðum busssambandi

**Setanarviðurskifti:** Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meira fæst at vita:** um størvini við at tosa við Rosu Prestá leiðara á tlf 471030/771030 ella Sólrún Dam varaleiðara á tlf 471034.

**Umsókn** við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20 oktober og sendast til:

**Dagsstovnurin á Flatinum**
Skúlavegur 4
400 Oyrarbakka

**Sunda Kommunu**

# Stongt

Sjúkrakassin er stongdur vegna feriu frá 25. oktober til 2. desember 2006, báðir dagar íroknaðir.

Í hesum tíðarskeiði verður eingin útgjalding. Tey, ið hava rokningar til endurrindan, verða biðin um at lata tær inn í seinasta lagi 19. oktober 2006. Um neyðugt er at fáa samband við sjúkrakassan í feriuni, er formaðurin at hitta á tlf. 424211.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**

**Frá Sunda kommunu**

# Leiðari

## til teknisku deildina hjá Sunda kommunu

Søkt verður eftir leiðara til teknisku deildina hjá Sunda kommunu.

**Starvið**
Tú kemur sum leiðari av teknisku deild at taka tær av leiðsluni av allari fyrisiting av deildini, herundir eftirlit og projektering av nýgerð og viðlíkahaldi av ognunum hjá kommununi. Sum leiðari verður tú eisini ráðgevi, málsviðgerði og skrivari hjá teknisku nevndini og brunanevndini. Leiðarin kemur eisini at ráðgeva øðrum nenvdum í kommununi.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir persóni, ið er útbúgvin sum verkfrøðingur/byggiverkfrøðingur, ella hevur aðra viðkomandi tekniska útbúgving og góðan teldukunnleika. Royndir innan almenna umsiting er ein fyrimunur.

**Vit bjoða tær**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fær møguleika at menna teknisku deildina.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. januar 2007, ella eftir nærri avtalu. Starvið verður lønt sambært galdandi sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Hava tygum áhuga, so eru tygum vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Sunda kommunu, Oyrarbakkavegur 3, Postboks 10, 400 Oyrarbakki, og skal henda vera kommununi í hendi í seinasta lagi 31. oktober 2006 kl. 16.00.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 471020 ella Heðin Zachariasen, borgarstjóra tlf. 771020.

Oyrarbakki, tann 9. oktober 2006
**Sunda kommuna**

# Reingerð

Starv sum reingerðarfólk hjá politinum í Havn er leyst at seta 1. november 2006.

Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna. Tríggjar tímar hvønn dag, frá mánadegi til og við fríggjadegi.

Løn verður veitt eftir galdandi sáttmála við fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast á politistøðini við at venda sær til Halldis Poulsen, skrivstovuleiðara á telefon nr. 35 14 48, lokal 2100.

Umsóknir um starvið skulu latast inn áðrenn 25. oktober 2006.

**Føroya Landfúti, tann 6. oktober 2007**

Karen Marie Olesen

# Skurtíð og burturkast

**Borgarar**
í limakommunum kunnu koyra skinn, innvøl og aðrar leivdir av skurðinum á bingjuplássið í kommununi.

Vemburnar skulu vera tómdar.

Saltið skal vera rakað av saltaðum skinnum

Koyr alt skurburturkast í bingju til burturkast, sum skal brennast.

**Vinnurekandi**
garðar og slaktarar skulu venda sær til IRF viðvíkjandi móttøku av burturkasti frá skurðinum.

Víst verður eisini til:
www.irf.fo og
IRF kalendaran 2005

IRF

# Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA

verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** 7. og 8. nov. 2006 og á **Landssjúkrahúsinum** 9. nov. 2006.

Tíð fæst við at ringja á **tlf. 45 45 45**, **mánadag og týsdag kl. 10-12**, í seinasta lagi týsdagin 31. oktober 2006.

# Teknmálstulkur

Søkt verður eftir útbúnum teknmálstulki at byrja skjótast gjørligt.

Starvið er 1/2 tíð og er dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært Starvsmannafelagssáttmálanum.

Umsóknarfreistin er 1. november 2006.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum skulu sendast til:

**Teknmálstulkatænastan**
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn

# Til sølu

Tvey hús á Tvøroyri til sølu.

**Tlf. 0045 31257797**